LØGTINGSGRANNSKOÐARARNIR
Heini O. Heinesen – Magni Laksáfoss – Anfinn Kallsberg – Mikkjal Sørensen

Føroya Løgting.

**Løgtingsmál nr. 72/2008: Grannskoðan av almennum roknskapum**

**Uppskot**
**til**
**samtyktar**

Vísandi til frágreiðing niðanfyri samtykkir Løgtingið at góðkenna **landsroknskapin fyri fíggjarárið 2007** við hesum viðmerkingum.

# 1 Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:

Sambært § 19 í grannskoðanarlógini – Ll. nr. 25/1999 – skulu løgtingsgrannskoðararnir í seinasta lagi 14 mánaðir aftaná, at fíggjarárið er liðið, leggja fyri Løgtingið uppskot til samtyktar um góðkenning av landsroknskapinum saman við viðmerkingum sínum.

Endamálið við grannskoðanini er at ansa eftir:

- *at* allar inntøkur landsins eru settar í roknskapin,
- *at* eingin útreiðsla er goldin uttan við heimild í fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg,
- *at* roknskapurin er rættur, og at tær avgerðir, roknskapurin fevnir um, eru samsvarandi veittum játtanum, galdandi lógum og fyriskipanum, verandi avtalum og vanligum siði,
- *at* hóskandi er atborið fíggjarliga í sambandi við umsiting av ognum og viðvíkjandi rakstri av teimum stovnum og tí virksemi, roknskapurin fevnir um,
- *at* roknskapar- og eftirlitsskipanir eru tryggar.

Arbeiðið hjá løgtingsgrannskoðarunum byggir á frágreiðingar frá Landsgrannskoðanini og frá privatum grannskoðarum. Umframt ársfrágreiðingina í oktober 2008 hevur Landsgrannskoðanin í september 2008 latið løgtingsgrannskoðarunum frágreiðing "um frávik millum játtan og nýtslu".

Frágreiðingarnar frá Landsgrannskoðanini eru lagdar við sum fylgiskjal 1 og 2, og ein samandráttur av frágreiðingunum frá privatu grannskoðarunum er lagdur við sum fylgiskjal 3. Landsroknskapurin 2007 er lagdur við sum fylgiskjal 4.

# 2 Viðmerkingar til frágreiðing um frávik millum játtan og nýtslu (fylgiskjal 1)

Løgtingsgrannskoðararnir halda tað als ikki vera nøktandi, at so stór frávik eru ár eftir ár.

Løgtingsgrannskoðararnir vilja minna á, at sambært stýrisskipanarlógini eigur meirnýtsla ikki at koma fyri. Tað eigur heldur ikki at koma fyri, at umbøn um eykajáttan verður løgd fyri Løgtingið so seint í árinum, at útreiðslurnar, sum eykajáttanin er ætlað til, longu eru hildnar. Fortreytirnar fyri eykajáttan eru m.a. eisini, at fortreytirnar fyri upprunaligu játtanini vóru so rættar sum gjørligt, eisini fyri lógarbundnu útreiðslurnar.

Løgtingsgrannskoðararnir kunnu eisini vísa á, at ein landsstýrismaður hevur ábyrgd av fyrisitingini av tí málsøki, sum lagt er til hansara, og løgmaður skal hava eftirlit við, at landsstýrismenn sita fyri sínum málsøki á lógligan og fullgóðan hátt.

## 2.1 Frávik, inntøkur

### Inntøkurnar av skatti 60 mió.kr. hægri enn mett var á fíggjarlógini (s. 24)

Størstu frávikini eru “Vanligur landsskattur” og “Kapitalvinningsskattur”, sum eru ávikavist 30,9 mió.kr. og 29,3 mió.kr. hægri, enn mett var. Sambært landsstýrismanninum er frávikið fyri “Vanligur landsskattur” stórt í krónum, men ikki í prosentum, um eykajáttanarumbønin hevði verið samtykt. At “Kapitalvinningsskattur” er væl hægri enn mett var, stendst í stóran mun av hækkaða rentustøðinum.

### Meirvirðisgjald o.o. avgjøld um 127 mió.kr. hægri, enn mett var á fíggjarlógini (s. 24-25)

Størstu frávikini eru “Meirvirðisgjald” og “Skrásetingargjald”, sum eru ávikavist 62,8 mió.kr. og 38,4 mió.kr. hægri enn mett var. Sambært landsstýrismanninum vórðu inntøkurnar væl hægri, tí metingin bygdi á, at vøksturin í nýtsluveitsluni seinnu árini fór at hasa av. Soleiðis varð ikki í 2007, men sum inntøkurnar fyri 2008 higartil hava verið, sær út til at vøksturin nú er hasaður av.

### Eingin útluting varð frá Fíggingargrunninum frá 1992 (s. 25)

Í fíggjarlógini var roknað við 50 mió.kr. í inntøkum frá Fíggingargrunninum. Sambært landsstýrismanninum gjørdu Føroya Banki og Fíggingargrunnurin av, í sambandi við søluna av partabrøvunum í Føroya Banka, ikki at rinda vinningsbýti fyri 2006.

### Inntøkurnar av sølu av partabrøvum í Føroya Banka vóru 812 mió.kr. hægri enn væntað (s. 27)

Sambært landsstýrismanninum stavar meirinntøkan frá, at 2/3 av partabrøvunum í Føroya Banka vórðu seldir til kurs 189, sum var munandi hægri kursur enn tann kursur, sum var grundarlagið undir játtanini.

## 2.2 Frávik, útreiðslur o.a.

Samlaða meirnýtslan fíggjarárið 2007 er um 121 mió.kr. á 45 játtanum.

### Løgmansfyrisitingin (s. 11-16)

At kalla eingin meirnýtsla.

### Fíggjarmál (s. 17-33)

Meirnýtslan er um 36 mió.kr. á 6 játtanum. Harafturat eru væntaðu inntøkurnar 5 mió.kr. lægri, tí ætlaða sølan av partabrøvum í P/f Elektron varð av ongum.

Størstu meirnýtslurnar eru FAS-endurgjald um 18 mió.kr. og stuðul til rentuútreiðslur, um 16 mió.kr.

### Fiskivinna (s. 35-41)

Meirnýtslan er um 9 mió.kr. á 10 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til Fiskiveiðieftirlitið, 3,6 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er oljuprísurin orsøkin.

### Vinnumál (s. 43-56)

Meirnýtslan er um 3 mió.kr. á 3 játtanum. Harafturat eru væntaðu inntøkurnar um 58 mió.kr. lægri.

- Ætlaða sølan av oljutangunum, sum landið eigur í Sørvági og í Søldarfirði, varð av ongum. Inntøkan av søluni var mett til 10 mió.kr.
- Ætlaða sølan av partabrøvum í P/f Føroya Lívstrygging, varð av ongum. Inntøkan av søluni var mett til 43 mió.kr.

- Ætlaða sølan av ymiskum partabrøvum varð av ongum. Inntøkan av søluni var mett til 4,6 mió.kr.
- Sambært landsstýrismanninum broyttu hann og Framtaksgrunnur Føroya lánsavtaluna 15. februar 2007, soleiðis at ein partur av restskuld grunsins, 93 mió.kr., skuldi gjaldast niður við 25 mió kr. í 2007. Restlánið er rentu- og avdráttarfrítt í 7 ár.
- Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar av at umskipa Postverk Føroya til partafelag 21,5 mió.kr. Á fíggjarlógini var eingin játtan. Inntøkan stavar frá afturgjaldi postverksins av rentuberandi láninum.
- Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2007 er tað sera torført at meta um inntøkurnar hjá landinum av at selja 33% av partabrøvunum í P/f Atlantic Airways. Meirinntøkan er 19 mió.kr.

## Útbúgving og gransking (s. 57-67)

Meirnýtslan er um 9 mió.kr. á 10 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til Læraraeftirlønir, 2,6 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er talan um lógarbundnar útreiðslur, ið ikki ber til at sleppa undan at gjalda.

## Heilsumál (s. 69-80)

Meirnýtslan er um 38 mió.kr. á 6 játtanum. Harumframt eru inntøkurnar 35 mió.kr. lægri, tí íbúðabygningarnir á Landssjúkrahúsinum ikki vórðu seldir. Á fíggjarlógini 2005 og 2006 vórðu teir mettir til 30 mió.kr., og á fíggjarlógini 2007 til 35 mió.kr. Á fíggjarlógini 2008 er eingin játtan. Sambært viðmerkingunum er høvuðskontan niðurløgd. Tað bendir á, at ætlanirnar at selja bygningarnar eru sleptar.

Meirnýtsla til Serviðgerð Uttanlands er 10 mió.kr.

Størsta meirnýtslan, um 20 mió.kr., stavar frá játtanini til Landssjúkrahúsið. Í mun til upprunaligu játtanina á fíggjarlógini 2007 er talan um eitt frávik um 27 mió.kr. Talan er um óvanliga stórt frávik. Í frágreiðingini vísir Landsgrannskoðanin á, at tað tykist, sum upprunaligu játtanirnar á fíggjarlógunum ikki eru nóg neyvt roknaðar út. Bæði í 2005 og 2007 varð longu í mars mánaði biðið um eykajáttan. Hóast eykajáttanirnar, er meirnýtslan árini 2004, 2006 og 2007 millum 10 og 20 mió.kr.

Landsstýrismaðurin hevur m.a. víst á, at hann ætlar at seta tiltøk í verk, sum skulu tryggja, at fíggjarlógin verður hildin í framtíðini.

## Almannamál (s. 81-93)

Meirnýtslan er um 26 mió.kr. á 9 játtanum. Størsta meirnýtslan er á játtanini til "Vanlig Forsorg", 16,5 mió.kr.:

- Fyribils hjálp § 9: Meirútreiðslurnar eru 1,3 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur meira enn 4.000 kr. fyri hvønn umsøkjara/móttakara.
- Meirútreiðslur brekað barn § 17: Meirútreiðslurnar eru 4,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur við nærum 3.000 kr. fyri hvønn umsøkjara/-móttakara. Umframt hækkaða kostnaðarstøðið annars, er útreiðslan til endurgjald fyri inntøkumiss økt.
- Endurbúgving § 18: Meirútreiðslurnar eru 1,5 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum er eindarkostnaðurin øktur meira enn 3.500 kr. fyri hvønn umsøkjara/móttakara.
- Hjálparamboð v.m. § 18: Meirútreiðslurnar eru 10,2 mió.kr. Sambært landsstýrismanninum eru serliga útreiðslurnar til sethúsaumvælingar og bilar øktar meira, enn mett var frammanundan.

## 2.3 Nakrar viðmerkingar um øktu rakstrarútreiðslurnar

Útreiðslurnar í landsroknskapinum eru býttar á høvuðsøki. Høvuðsøki 1 eru rakstrarútreiðslur, sum eru greinaðar á standardkonturnar fyri lønir, keyp av vørum og tænastum, keyp av útbúnaði, leiga, viðlíkhald og skattur, o.s.fr. (st.konta 11-19).

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar fyri fíggjarárið 2007 vóru góðar 3 mia.kr. Niðanfyri er ein talva, sum vísir vøksturin í samlaðu rakstrarútreiðslunum árini 2003-2007.

| St.konta | Heiti | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 11 | Lønir v.m. | 1.632.051 | 1.748.143 | 1.742.532 | 1.774.633 | 1.893.281 |
| 14 | Keyp av vørum og tænastum | 790.586 | 804.141 | 836.066 | 873.678 | 970.156 |
| 15 | Keyp av útbúnaði, netto | 81.807 | 70.573 | 77.638 | 107.189 | 104.019 |
| 16 | Leiga, viðlíkahald og skattur | 87.026 | 77.978 | 75.737 | 86.302 | 97.776 |
| 17 | Avskrivingar o.a. | 2.444 | 2.706 | 1.314 | 114 | 1.471 |
| 19 | Ymsar rakstrarútreiðslur | 8.343 | 7.107 | 4.042 | 9.535 | 12.538 |
| | **Tilsamans** | **2.602.257** | **2.710.649** | **2.737.329** | **2.851.451** | **3.079.240** |

Sum tað sæst, økjast rakstrarútreiðslurnar støðugt árini 2003-2007.

Verður aftur tikið støði í rakstrarútreiðslunum, er meirnýtslan í % økt seinastu árini. Á stabba-myndunum niðanfyri eru rakstrarútreiðslurnar settar í mun til upprunaligu játtanina og endaligu játtanina. t.e. við eykajáttanum.







Løgtingsgrannskoðararnir halda tað vera óheppið, at meirnýtslan til rakstrarútreiðslur økist á hvørjum árið, bæði í krónum og prosentum. Løgtingsgrannskoðararnir heita á landsstýris-menninar um at síggja til, at játtanarreglurnar verða hildnar.

## 2.4 Onnur viðurskifti

### Ógreiða um játtanina til felags viðlíkahald (s. 27-28)

Í frágreiðingini í oktober 2006 vísti Landsgrannskoðanin á, at á mestsum øllum málsøkjum vóru fleiri dømi um, at tað kundi tykjast tilvildarligt og ógreitt, hvat varð bókað á játtanina til “felags viðlíkahald”, og at tørvur var á at útgreina eina mannagongd á hesum øki. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum var samdur.

Í juni 2008 staðfesti landsstýrismaðurin, at enn er eingin reglugerð gjørd, men at Fíggjarmálaráðið hevur somu áskoðan á málið, sum fyrr fráboðað.

### Fyrisitingarútreiðslur verða spjaddar (s. 28)

Í frágreiðingini í oktober 2006 vísti Landsgrannskoðanin á dømi, har fyrisitingarútreiðslur hjá nøkrum stovnum og aðalráðum vórðu spjaddar á aðrar játtanir. Landsgrannskoðanin helt ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum helt eisini í oktober 2006, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið ætlaði at gjøgnumganga hesar høvuðskontur.

Í juni 2008 ásannaði landsstýrismaðurin, at dentur var ikki lagdur á henda spurning, tá ið fíggjarlógin fyri 2008 var til viðgerðar. Fíggjarmálaráðið fer at gera eina roynd aftur at taka spurningin upp við hini aðalráðini í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2009.

# 3 Viðmerkingar til ársfrágreiðing frá Landsgrannskoðanini (Fylgiskjal 2)

## 3.1 Formlig viðurskifti

### Roknskaparframløga og –góðkenning (s. 9)

Í frágreiðingini vísir Landsgrannskoðanin á, at fyri árið 2007 hevur Gjaldstovan bert fingið góðkenningaroyðubløð fyri 100 stovnsnummur, hóast samlaða talið á stovnsnumrum er 580. Harafturat eru flestu góðkenningar sendar Gjaldstovuni ov seint. Tá ið havt verður í huga, at góðkenningarmannagongdirnar eru grundarlagið undir ársroknskapinum, heldur Landsgrannskoðanin tað als ikki vera nøktandi, at reglurnar um at lata inn góðkenningarskjøl ikki verða hildnar.

Løgtingsgrannskoðararnir heita á løgmann, landsstýrismenn og aðalstjórar um at syrgja fyri, at ásetingarnar í roknskaparkunngerðini verða hildnar.

### Hóskandi tíðarskrásetingar (s. 10-11)

Sambært roknskaparkunngerðini skulu aðalráðini og stovnar teirra í seinasta lagi 1. januar 2010 hava sett í verk stýringarmeginreglur um mál, nádd úrslit o.t. Skulu ásetingarnar útinnast tíl ásettu tíðina – um eitt ár – heldur Landsgrannskoðanin tað vera umráðandi, at aðalráð og stovnar seta í verk tíðarskráseting, har eisini sæst, hvat arbeiðstíðin verður brúkt til.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla staðiliga løgmanni, landsstýrismonnum og aðalstjórum til at hava eyguni eftir, at hóskandi skrásetingar av nøgdarupplýsingum, tilfeingisnýtslu (t.d. tíðarnýtslu hjá starvsfólkum) verða settar í verk til ásettu tíðina.

## 3.2 Løgmansfyrisitingin

### Samskiftisútreiðslur hjá landsstýrinum (s. 14-16)

Síðani 2000 hevur Landsgrannskoðanin víst á, at ongin lógarheimild er at endurrinda samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum.

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir mælt løgmanni til at greiða spurningin um lógarheimild at endurrinda samskiftisútreiðslur hjá løgmanni og landsstýrismonnum. Løgtingsgrannskoðararnir átala, at málið framvegis ikki er loyst.

### Um lógarsmíð (s. 16-17)

Síðani 2003 hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingum gjørt vart við, at lógargrundarlagið sum heild tykist vera eitt tað størsta vandamálið í umsitingini. Á fleiri málsøkjum er lógargrundarlagið ófullfíggjað**.**

Í oktober 2007 boðaði Løgmaður frá, at hann hevði sett í verk eitt útgreiningararbeiði til tess at betra um lógardygdina. Ein arbeiðsbólkur varð settur við einum umboði úr hvørjum stjórnarráði. Í bólkinum vóru royndir løgfrøðingar í miðfyrisitingini og tríggir aðalstjórar. Í oktober 2008 hevur løgmaður kunnað um, tað framvegis verður arbeitt við verkætlanini.

Løgtingsgrannskoðararnir hava áður víst á, at verandi trupulleikar við lógarsmíði eru eitt langtíðar vandamál, ið løgmaður má taka stig til at loysa sum skjótast.

## 3.3 Fíggjarmál

### Landsroknskapurin ikki fullfíggjaður (s. 19)

Seinastu nógvu árini hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir ferð eftir ferð gjørt vart við, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum. Onki er hent í málinum seinasta árið.

Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís víst á fleiri grundleggjandi ivaspurningar, tá ið ræður um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti:

- Um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum.
- Um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum.
- Um allir skattir/gjøld verða kravdir inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini.
- Um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini.
- Hvussu landsins gjaldføri skal verða gjørt upp og umsitið.

Løgtingsgrannskoðararnir átala, at ivaspurningarnir um játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti enn ikki eru loystir, hóast málið er umrøtt í áravís. Løgtingsgrannskoðararnir mæla enn einaferð landsstýrismanninum til at greiða hetta mál.

### Búskaparskipan landsins ikki fullnýtt (s. 20-22)

Løgtingsgrannskoðararnir hava fleiri ferðir víst á, at peningur og starvsfólkaorka verða ikki nýtt á skynsaman hátt, og Búskaparskipan landsins verður ikki gagnnýtt í tann mun, ætlanin var.

Løgtingsgrannskoðararnir vilja enn eina ferð mæla landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at gera eina ítøkiliga langtíðarætlan fyri, hvussu roknskaparviðurskiftini, út frá einum heildarsjónarmiði, kunnu um- og samskipast, soleiðis at umsitingin verður bíligari og betri.

### Tænastumannaeftirlønir o.t. (s. 23-25)

Í frágreiðingum seinastu árini hevur Landsgrannskoðanin víst á, at umsitingin av tænastumannaeftirlønum er ikki nøktandi. Fíggjarmálaráðið hevur sett nøkur tiltøk í verk at samskipa umsitingina.

### Um ávísar útreiðslur (s. 25-30)

Í februar 2006 læt Landsgrannskoðanin løgtingsgrannskoðarunum eina frágreiðing um reglur og siðvenjur viðvíkjandi ávísum útreiðslum. Løgtingsgrannskoðararnir høvdu biðið um kanningina, ið m.a. fevnir um ferða-, samskiftis-, umboðanar- og starvsfólkaútreiðslur o.t.

Í mars 2006 mæltu løgtingsgrannskoðararnir landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at áseta greiðar reglur um ávísar útreiðslur, so allir partar vita, hvat er rætt, og hvat er skeivt.

Í uppskoti til samtyktar, sum varð einmælt samtykt av Løgtinginum 9. mars 2007, átalaðu løgtingsgrannskoðararnir, at hesi viðurskifti ikki vóru fingin í rættlag. Teir mæltu staðiliga landsstýrismanninum til at greiða hetta mál, soleiðis at hóskandi og fullgreiðar reglur vórðu ásettar og hildnar.

Spurdur um málið, hevur landsstýrismaðurin í august 2008 víst á, at miðfyrisitingin setur skynsemi í hásæti, og at leiðslan skal kunna brúka tað, sum hon heldur vera rímiligt, til tess at fáa starvsfólkini at mennast og trívast.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur eftir øllum at døma ongar ætlanir um at áseta reglur, og setur sostatt til viks eina løgtingssamtykt.

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at hesi viðurskifti ikki eru fingin í rættlag, og mæla enn einaferð landsstýrismanninum til at greiða hetta mál, soleiðis at hóskandi og fullgreiðar reglur verða ásettar og hildnar.

### Fíggjarstøðan ikki fullfíggjað (s. 30)

Landsgrannskoðanin heldur tað vera ivasamt, um grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan eru hildnar, vísandi til, at fleiri stovnar og grunnar eru ikki við í fíggjarstøðuni. Harumframt er virðið á partabrøvunum í landsroknskapinum helst undirmett við um 0,5 mia.kr. Samanlagt eru virðir fyri um 3 mia.kr. netto ikki tald við í fíggjarstøðuni 2007.

### Kapitalogn í landsfyritøkum (s. 32-33)

Ongin allýsing finst av hugtakinum “landsfyritøka”. Í nógv ár hevur Løgtingið í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin mælt til at fáa greiði á hesum roknskaparposti.

Fíggjarmálaráðið kunnaði í oktober 2005 um, at ætlanin var at taka málið upp, og at miðað varð ímóti at taka allar grunnar o.l. við sum ogn í landsroknskapinum 2005, men tað varð ikki gjørt.

### Partabrøv skrásett í landsroknskapinum (s. 34-36)

Í landsroknskapinum 2007 er partapeningurin skrásettur við keypsvirðinum. Talan er bæði um keyp til undirkurs, til yvirkurs og til útgávukurs. Skrásetti partapeningurin gevur sostatt onga ábending um aktuella virðið á feløgunum.

### Ognir og útbúnaður (s. 38-39)

Sambært § 20 í roknskaparkunngerðini skal yvirlit yvir ognir og útbúnað vera á øllum stovnum. Bert fáir stovnar hava dagførd yvirlit.

### Tøkur peningur (s. 39-40)

Fleiri landsstovnar og -grunnar, ofta við leysum tilknýti til fíggjarlógina og/ella landsbókhaldið, hava fleiri hundrað milliónir krónur standandi á banka- og girokontum, sum ikki eru við í landsroknskapinum. Hugtøkini “landskassin” og “landsstovnar” eru ikki nóg greitt lýst, hvørki í lógunum ella í viðmerkingunum til lógirnar.

Í fleiri uppskotum til samtyktar seinastu árini hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at útrokningin av bruttotjóðarúrtøkuni byggir á eitt leyst grundarlag, og at hugtøkini “landskassin” og “landsstovnar” í lógini “um Landsbankan” og í lógini “um landskassans innlán og lán í Landsbankanum” eru ógreið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla enn einaferð landsstýrismanninum í fíggjarmálum til at fáa greiði á hesum viðurskiftum.

### Umsiting av skatti, avgjøldum o.a. (s. 43-60)

Í uppskotum til samtyktar seinastu árini hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at saknur er á yvirskipaðum ætlanum um ráðlegging, eftirlit og skráseting, og tørvur er á at bøta um innaneftirlitið sum heild, tá ið ræður um eitt týðandi øki sum umsiting av skatti, mvg, innflutnings- og øðrum avgjøldum, og av stuðulsskipanum.

- Í oktober 2008 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at roknskaparreglugerðin nú er dagførd, og TAKS vísir á, at avrikssáttmálin ásetur stevnumið og árligar virkisætlanir. Landsgrannskoðanin heldur ein avrikssáttmála vera góðan, men hann broytir hvørki ábyrgdina hjá landsstýrismanninum, ella tær fyriskipanareglur, sum eru galdandi fyri TAKS.
- Ein kanning í 2007 vísti, at nógvir veikleikar eru við umsitingini av mvg. Tá ið hugsað verður um, at meirvirðisgjaldið er eitt av stóru inntøkusløgunum hjá landskassanum, er tað av alstórum týdningi, at økið verður raðfest høgt, at váðametingar verða gjørdar, og at eftirlitini eisini verða løgd, har váðin er størstur.
- Ein kanning í 2006 vísti, at fleiri heimildir, sum vórðu settar í mvg-lógina í 1995 (§ 23a), verða ikki brúktar í tann mun, ætlanin var.
- Hóast TAKS síðani 2002 hevur ásannað, at eftirlit við avgjaldi á framleiðslu er ikki nóg væl greinað í roknskaparreglugerðini o.ø., er onki gjørt við at bøta um vegleiðingar og reglur. Ein kanning í 2008 vísti at veikleikar eru við álíkningini, bókingini og inn-

krevjingini av avgjaldinum, og at tørvur er á at áseta reglur, sum kunnu tryggja landskassanum sínar inntøkur.

- Í 1997 setti Landsgrannskoðanin fyrstu ferð spurningarnar um at endurrinda oljuavgjald til gistihús. Tað er ikki nøktandi, at TAKS og landsstýrismaðurin ár eftir ár bert vísa til ætlanir hjá TAKS.
- Ein avleiðing av rentustuðlinum tykist vera, at fólk verða eggjað til ikki at rinda síni sethúsalán aftur. Landsgrannskoðanin ivast í, um tað var endamálið við at veita rentustuðul.
- Hóast Landsgrannskoðanin í mai 2007 ætlaði at grannskoða umsitingina av kapitaleftirlønum, er grannskoðanin ikki sett í verk, tí tað hevur ikki borið til at fáa í lag fund við leiðsluna á TAKS um grannskoðanina.

Løgtingsgrannskoðararnir heita staðiliga á landsstýrismannin í fíggjarmálum um alt fyri eitt at seta tiltøk í verk fyri at fáa omanfyrinevndu viðurskifti í rættlag, og løgtingsgrannskoðararnir átala hvassliga, at landsstýrismaðurin og TAKS ikki svara skrivum frá Landsgrannskoðanini.

### Roknskaparviðurskifti hjá kommununum (s. 66-67)

Løgtingsgrannskoðararnir hava í áravís víst á, at tað er umráðandi at tryggja, at roknskapar- og KT-viðurskiftini hjá kommununum koma í eina tryggari legu, fyri betur at kunna samanbera roknskapir millum kommunur, og millum land og kommunur.

Løgtingsgrannskoðararnir fegnast um, at í oktober 2008 varð kunngerð "um roknskaparverk kommunanna o.tíl." lýst til at fáa gildi frá 1. januar 2009.

## 3.4 Fiskivinna

### Grannskoðan av Fiskimálaráðnum (s. 69-70)

Landsgrannskoðanin vísir á, at samanumtikið hevur gingið striltið at fingið svar frá Fiskimálaráðnum, og er tað sera darvandi fyri arbeiðið hjá Landsgrannskoðanini.

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at so long tíð gongur áðrenn Fiskimálaráðið svarar skrivum frá Landsgrannskoðanini, og at svarini eru ófullfíggjað.

### Søla av landsjørð og umsiting av landbúnaðarstuðuli (s. 71)

Landsgrannskoðanin umrøddi í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í november 2007 søluna av landsjørð og umsitingina av landbúnaðarstuðuli. Í februar 2008 boðaði Vinnumálaráðið frá, at málsøkið er flutt til Fiski- og Tilfeingismálaráðið. Landsgrannskoðanin sendi frágreiðingina til landsstýrismannin í fiski- og tilfeingismálum í februar 2008 men hevur, hóast fleiri áminingarskriv, onki svar fingið.

Løgtingsgrannskoðararnir átala at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum ikki svarar skrivum, og heita á landsstýrismannin um alt fyri eitt at seta tiltøk í verk fyri at fáa viðurskiftini í rættlag.

## 3.5 Vinnumál

### P/f Fiskaaling og havbúnaðarroyndir (s. 76-78)

Landsgrannskoðanin vísir á, at vinnuligi parturin av virkseminum hjá P/F Fiskaaling er at kalla burtur.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í vinnumálum til at taka upp spurningin, um tað er skilagott at reka tílíkt virksemi í einum partafelag.

## 3.6 Útbúgving og gransking

### Óloyst mál (s. 81-93)

Í frágreiðingum frá Landsgrannskoðanini og í uppskotum til samtyktar frá løgtingsgrannskoðarunum sæst, at nógv mál eru umrødd í áravís, uttan at nakað ítøkiligt hendir. Vísandi til

frágreiðingina frá Landsgrannskoðanini eru framvegis nógv óloyst mál innan útbúgving og gransking:

- Umsiting av Musikkskúlaskipanini (s.81)
- Umsiting av Frítíðarundirvísingini (s. 81-82)
- Vantandi reglur um Yrkisskúlar (s. 83)
- Samskipan av virkseminum hjá sjómansskúlunum (s. 86-87)
- Vantandi sáttmálaásetingar og vantandi reglur fyri tímaútrokning og lønaráseting á Føroya Læraraskúla (s. 87-88)
- Játtanar-, roknskapar- og ognarviðurskiftini hjá Listasavni Føroya (s. 93).

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð, at málini ikki verða loyst, og heita á landsstýrismannin í mentamálum um at taka stig til at málini, sum eru nevnd omanfyri, verða loyst.

### Stuðul til privatar skúlar (s. 88-92)

Játtanin til Húsarhaldsskúla Føroya er um 2 mió.kr. í 2007. Landsgrannskoðanin heldur, at sæð frá einum eftirlitssjónarmiði er tað sera óheppið, at landið veitir eina so stóra árliga upphædd í studningi sum "onnur játtan". Verður játtanin tikin við á fíggjarlógina sum "rakstrarjáttan", kemur skúlin undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í Mentamálum til at taka upp spurningin, um tað ikki er skilabetri at játtanin til Húsarhaldsskúla Føroya verður tikin við á fíggjarlógina sum rakstrarjáttan.

## 3.7 Almanna- og Heilsumál

### Vantandi reglur sambært forsorgarlógini (s. 102-104)

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava Løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett lógarásettar reglur um endurgjald fyri inntøkumiss sambært § 17 í forsorgarlógini.

Løgtingsgrannskoðararnir átala enn einaferð, at landsstýrismaðurin í almannamálum framvegis ikki hevur ásett umrøddu reglur um endurgjald fyri inntøkumiss.

Hóast nærum 20 ár eru liðin, síðani Landsgrannskoðanin fyrstu ferð heitti á Landsstýrið um, sambært § 18, stk. 1-5, í forsorgarlógini at áseta gjøllari reglur um stuðul til endurbúgving o.a., hevur landsstýrismaðurin framvegis ongar reglur ásett.

Í uppskotum til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin hava løgtingsgrannskoðararnir fleiri ferðir átalað, at landsstýrismaðurin ikki hevur ásett neyvari reglur á hesum týðandi øki, har nógvur peningur verður brúktur.

Løgtingsgrannskoðararnir átala harðliga, at neyvari reglur um endurbúgving o.a. enn ikki eru ásettar, hóast hesin trupulleiki hevur verið umrøddur í frágreiðingum í áravís.

### Vantandi dagføring av forsorgarlógini (s. 104-106)

Síðani miðskeiðis í nítiárunum hava skiftandi landsstýrismenn í almannamálum boðað frá, at teir hava arbeitt við nýggjari lóggávu, og at øll almannalóggáva fór at verða lagað til føroysk nútíðarviðurskifti innan stutta tíð. Enn er onki lógaruppskot lagt fyri Løgtingið.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í almannamálum til beinanvegin at seta gongd á arbeiðið at smíða nýggja forsorgarlóg.

### Studningur til ALV (s. 114-115)

Játtanin til ALV er 5,4 mió.kr. í 2007 og 6,1 mió.kr. í 2008. Landsgrannskoðanin heldur, at út frá einum eftirlitssjónarmiði er tað sera óheppið, at landið veitir eina so stóra árliga upphædd í studningi sum “onnur játtan” uttan aðra lógarheimild enn fíggjarlógina. Landið fíggjar so at siga allan raksturin av hesum virksemi, og verður játtanin tikin við á fíggjarlógina sum ein “rakstrar-játtan”, kemur ALV undir at kalla somu játtanar-, roknskapar- og grannskoðanarreglur, sum galda fyri landsstovnar.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla til at játtanin til ALV verður tikin við á fíggjarlógina sum rakstrarjáttan.

## 3.8 Innlendismál

### Ítróttavedding (s. 118-122)

Hóast lóg um ítróttavedding kom í gildi í apríl 1999, hevur føroyska heimastýrið ikki enn ásett gjøllari reglur um roknskapar- og grannskoðanarviðurskifti.

Landsgrannskoðanin heldur tað neyvan tæna nøkrum endamáli framhaldandi at umrøða málið í ársfrágreiðingum, eftirsum landsstýrismaðurin eftir øllum at døma ongar ætlanir hevur um at áseta tílíkar reglur.

Løgtingsgrannskoðararnir mæla landsstýrismanninum í innlendismálum til at áseta neyvari reglur.

# 4 Frágreiðingar frá privatum grannskoðarum (Fylgiskjal 4)

Í hjálagda fylgiskjali „Samandráttur av frágreiðingum frá privatum grannskoðarum“ er kunnað um viðmerkingar í grannskoðanarfrágreiðingum frá privatu grannskoðarunum. Í flestu førum er einki at finnast at.

**Løgtingsgrannskoðararnir, 3. februar 2009**

| | |
|---|---|
| Heini O. Heinesen, formaður | Magni Laksáfoss |
| Anfinn Kallsberg | Mikkjal Sørensen |